ítróttur

Nr. 221 • mikudagur • 18. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Bartal heldur fram í ÍF

Fleiri feløg hava dyrgt eftir sterka verjuleikaranum, men nú er so staðfest, at hann heldur fram í Fuglafirði

ÍF-FYRIREIKINGAR
Jákup Mørk

Einki er at ivast í, at Bartal er ein av føroysku verjuleikarunum, sum stendur sera høgt í metum hjá fleiri feløgum.

Sum skilst, so hava eisini fleiri av størru feløgunum dyrgt eftir undirskriftini hjá sterka verjuleikaranum, men nú er avgerðin so tikin. Og hon sigur, at tað eisini næsta kappingarár verður í barndómsfelagnum, at Bartal fer at spæla fótbólt.

Við hesum verður í Fuglafirði roknað við, at tey nú eru um at hava allan hópin endaliga upp á pláss til komandi kappingarár.

Tað verður ikki sagt hart, men sum skilst, so eru bert tvey ivamál nú eftir. Annað er, um Høgni Madsen fer at halda fram í felagnum, og hitt tykist vera, hvør skal verja málið hjá besta mannsliðnum, nú Karstin Joensen hevur tikið av tilboði frá barndómsfelagnum, KÍ.

Bartal Eliasen hevur gjørt av, at hann eisini verður í ÍF komandi kappingarár

Arnbjørn aftur á Toftum

Hóast teir verða millum teir næstbestu, so fyrireikar B68 seg til næsta kappingarár, sum um teir skulu spæla í bestu deildini

B68 FYRIREIKING
Jóannes Hansen

Hóast vit skulu spæla í næstbestu deildini, so fyrireika vit okkum sum um, at vit skuldu havt átt pláss í bestu deildini. Hetta var boðskapurin hjá formanninum, tá ið B68 fyri einum mánaði síðani hevði ársveitslu.

B68 viðhaldsfólkini vóru spent at frætta, hvussu felagið fer at brynja seg næsta ár, men tá var einki at frætta. Einki uttan tað at tað millum veitslugestirnar vóru spælarar, sum áður hava spælt við B68, og at tað av fleiri varð mett sum ábending um, at teir vóru aftur á veg á Svangaskarð.

Í fyrradagin visti B68 heimasíðan at siga, at ein av fyrrverandi B68 spælarunum nú fer aftur at spæla í barndómsfelagnum. Talan er um Arnbjørn Danielsen, sum fleiri av mongu teimum seinastu árunum hevur verið í B36. Sambært b68.fo hava B68 og Arnbjørn Danielsen skrivað undir tvey ára samstarvsavtalu. Arnbjørn var í B68 í 2002, men síðsta kappingarár var hann aftur í B36.

Ofta plagar tað at vera soleiðis, at talan er um fráflyting, tá ið eitt lið flytir niður. Av teimum, sum spældu við B68 í fjør, er tað greitt, at Herbert í Lon Jacobsen er fluttur til B36, og at ein av brasiliumonnunum, Morinio, og bulgarski spælarin, Stanislav Stankhow, ikki fara at spæla á Toftum næsta ár. Einki hevur verið at hoyrt um, hvussu tað verður við Mikkjal Thomassen, sum í fjør spældi á Toftum. Seinna partin av kappingarárinum var Meinhardt Joensen úr Klaksvík málverji hjá B68. Nú fer hann at spæla í Gøtu.

Tveir brasiliumenn, Fabricio og Andersson, fara næsta ár aftur at spæla við B68.

Enn hevur einki verið at frætt um, hvør skal venja B68 næsta kappingarár. Seinna partin av síðsta kappingarári hevði Trygvi Mortensen ábyrgdina av B68 liðnum. Tað er greitt, at hann fer ikki at halda fram á Toftum, tí hann hevur skrivað undir sáttmála, sum ber við sær, at hann verður venjari hjá NSÍ.

Tjaldur møttu ikki

Ætlaði dysturin millum Stjørnuna og Tjaldur varð av ongum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Áskoðararnir, sum ætlaðu sær at síggja ein stórsigur í KÍ-høllini í kvøld, máttu vónsvikin aftur til hús. Ætlaði dysturin millum Stjørnuna og Tjaldur varð nevnliga av ongum, tí Tjaldur møtti ikki til dystin.

Í Tjaldri siga tey, at tey longu mánadagin høvdu biðið um at fáa dystin fluttan. Hetta tí felagið hevur nýggjan venjara, og tí hesin vildi síggja liðið, áðrenn hann fór nakran veg við kvinnunum til dyst.

Tí ringdi Tjaldur til Stjørnuna, fyri at vita, um dysturin kundi flytast, men hetta vildi Stjørnan ikki ganga við til. Endin varð so, at Tjaldur ongan tíð kom til Klaksvíkar.

Stutt undan dystinum var tó aftur samband millum Stjørnuna og Tjaldur. Semja varð tá um, at dysturin í fyrstu atløgu verður útsettur, og at Stjørnan skal koma við einum útspæli um, nær nýggi dysturin verður.

Allan heldur oddasessinum

Liðið hjá Allani Dal-Christiansen er framvegis á odda í FM-kappingini í bridge

BRIDGE
Bogi Simonsen

Tvey umfør í liðkappingini í bridge vóru leikt um vikuskiftið í skúlanum á Kambsdali. Bæði umførini vóru leikt leygardagin. Í 1. deild hevur liðið hjá Allan Dal- Christiansen lagt seg klárt á odda, meðan liðini hjá Boga Simonsen og Dia Petersen eru jøvn á øðrum plássið.

Støðan í 1. deild

1 Allan Dal-Christiansen	110
2 Bogi Simonsen	94
2 Dia Jacobsen	94
4 Gunnar Mouritsen	65
5 Jóna Grunnveit	40
6 MBM	35

Í 2. deild hevur liðið hjá Hallur Ellingsgaard lagt seg á odda, men av tí at liðið hjá Óla Holm ikk hevði møguleika fyri at spæla sínar dystir hetta vikuskiftið og mangla sostatt tveir dystir og liðini hjá Jórun Johannesen og Maritu Krosstein mangla at spæla ein dyst, skal støðan sum hon er nú takast við fyrivarni.

Støðan í 2. deild

1 Hallur Ellingsgaard	98
2 Ingolf S. Olsen	84
3 Jórun Johannesen	63
4 Marita Krosstein	50
5 Óli Holm	49
6 Sámal P. Johannesen	5

Í 3. deild er liðið hjá Marjun Restorff, ið undan kappingini eisini var mett sum sterkasta lið í 3. deild, klárt á odda við 110, meðan liðið hjá Jákup Egholm er nr. 2 við 88 stigum.

Støðan í 3. deild

1 Marjun Restorff	110
2 Jákup Egholm	88
3 Røgvi Nielsen	49
4 Mortan Thomsen	44

Multihold

Multihold er ein háttur í áleið sigur hvussu tey einstøku pørini hava klára seg.

Multihold í 1. deild

Per Kallsberg - Dánjal Pauli Mohr	19,57 (7)
Jóannes Mouritsen - H. Mouritsen	19,20 (7)
Dia Petersen - Marner Joensen	17,56 (10)
Allan- Dal Christiansen - Magni Jøkladal	17,30 (6)
Bogi Simonsen - Símin Lassaberg	16,93 (8)

Multihold í 2. deild verður ikki gjørt upp, tí fleiri dystir ikki eru leiktir

Multihold í 3. deild

Petur A. Johannesen - Eilif Petersen	19,04 (8)
Salamon Johansen - Zakaris Joensen	18,62 (8)
Jákup Egholm - Tummas Hans	15,30 (10)

Grand Prix Parakapping

Sunnudagin varð skipað fyri almennari parakapping í Lonini í Fuglafirði. Kappingin var spæld sum ein barometur kapping, hetta vil siga, at øll spæla somu spøl í sama umfari, soleiðis at hvørt umfar kann vera uppgjørt beinanvegin, og kann tí alla tíðina fylgjast við í samlaðu støðuni.

Vinnari av kappingini gjørdust enn einaferð Eyðun Anthoniussen og Robert Langgaard. Teir fingu ikki færri enn 71 %, ið má sigast at vera sera flott.

Um vikuskiftið varð eisini skipað fyri barometur-parakapping

Handilslærlingur søkist

Kundi tú hugsa tær eina framtíð innan handilsverðina?

Vit hava brúk fyri einum handilslærlingi (m/k).

Vit kunnu bjóða tær:

- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu, har tú gerst partur av einum góðum toymi, og har arbeiðsandin er av teim bestu
- Tryggar arbeiðsumstøður
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.
Lærutíðin er ávíkavist 2 ella 3 ár.
Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri at taka eina hjálpandi hond í tá á stendur. Til tíðir kann vera sera nógv at gera.
Vit eru í holt við at umvæla og vaksa um handilin, so tí hevur tú møguleikan at seta tíni fingramerki á, hvussu handilin í framtíðini skal síggja út.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Jan Danielsen, stjóra.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og ummælum í seinasta lagi 23. november 2004.

pf Klement Petersen

Tlf. +298 447560 · Fax +298 448460
e-mail: jandan@klementpetersen.fo

Pf. Klement Petersen er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 10 fólk í starvi. Vit selja í høvuðsheitum tilfar til byggivinnuna og til hús, so sum køkar, hvítvørur, tak, gólv o.m.a.

Handverksáhugað í Norðoyggjum

Farið verður nú undir at kanna og skráseta handverk í Føroyum. Byrjað verður í Norðoyggjum.

Fundur verður í Ósá skúlanum í Klaksvík hóskvøldið 18. november kl.19.30.

Skrá: Stutt frágreiðing um kanningina, vegleiðing viðvíkjandi spurnarbløðum, drekkamunnur og prát.

Stuðlið føroyskum handverki og møtið fjølment!

v/ Føroya Heimavirkisfelag
Randi Vang og Jónhild Johannessen

Søkt verður eftir

timburmonnum

SP/f Bygningstænastan
v. Jógvan Joensen
Tlf. 441952 · fartlf. 592771

Fólkaflokkurin hevur

LANDSFUND

27. november 2004 kl. 10.00 á Hotel Hafnia.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, verður gestarøðari.

Rúna Sivertsen viðgerð evni »Felags avgerðir – felags ábyrgd«.

Landsfundurin endar við døgurða.

Øll fólkafloks áhugað eru hjartaliga vælkomin.

Skattalistin fyri 2003

Skattalistin fyri Nes kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni, frá 23. november til 9. desember 2004.

Nes kommuna

Skattalistin fyri 2003

Skattalistin fyri Sørvágs kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni hvønn gerandisdag frá kl. 8.00 til 17.00, frá 18. november til 2. desember.

Sørvágs kommuna

Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið í sambandi við gerð av einum 200 m longum útstykkingarvegi í Norðragøtu boðin út í almennaðari lisitastión.

Lisitatiónin verður á kommunuskrivstovuni við Gøtugjógv týsdagin 30. november 2004 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bileggast til, í seinasta lagi týsdagin 16. novembur við at gjalda kr. 5.000,- í veðhald á konto nr. 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent, í seinasta lagi, eina viku eftir lisitastiónina.

sp/f Teknistovan
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen
ráðg. Byggifrøðingar
FO- 510 Gøta
tel: 44 21 05 · fax: 44 21 07
email: klement@post.olivant.fo

JÓLASØLA

Við hondgjørdum lutum verður á verkhúsinum í Saltangará leygardagin 20. nov kl. 10 - 14.

Eisini verður málningaframsýning, vørutombula og kaffisøla.



Verkhúsið Stíggjur

Toyota - dele

brugte og nye

Vi sender hver dag til Færøerne

AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

MÁLNINGAFRAMSÝNING

Oljumálningar við føroyskum myndevni eftir John Gardner, sum er av føroyskari ætt, verða sýndir fram á Suðuroyarvegi 13 frá leygardegnum 20. november.
Opið er hvønn dag kl. 15-22

Eva J. Jacobsen

Skattalistin

Skattalistin fyri Vágs kommunu fyri árið 2003 liggur frammi til alment eftirlit á Býráðsskrivstovuni frá 22. november til 3. desember 2004.

Vágur, tann 16. nov. 2004
Vágs Býráð